LM-087/2023

Fylgiskjal 12

Dátueftirlitið

Løgmálaráðið

Saltangará, tann 5. februar 2024
J.nr: 24/01433-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: TH/HAB

Viðvíkjandi.: Hoyringssvar - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum

Dátueftirlitið hevur fingið omanfyrinevnda løgtingslógaruppskot til hoyringar. Dáturáðið hevur viðgjørt uppskotið á fundi tann 25. januar 2024, og hevur hesar viðmerkingar:

Dátueftirlitið tekur undir við ætlaðu broytingini í dátuverndarlógini.

Í juli 2023 samtykti Dáturáðið, at senda landsstýrismanninum í lógarmálum eina áheitan um, at broyta § 73 í løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum. Ásetingin loyvir Dátueftirlitinum at almannakunngera sínar avgerðir treytað av, at tær eru gjørdar navnleysar. Hetta merkir bæði at øll nøvn skulu strikast, og at almannakunngerðingin skal gerast á slíkan hátt, at fyritøkur, stovnar og persónar ikki kunnu eyðmerkjast.

Dáturáðið fegnast um, at landsstýrismaðurin hevur gingið ynskjunum hjá Dátueftirlitinum á møti, og hevur tikið stig til at broyta verandi áseting.

Dátueftirlitið metir, at í løtuni er nyttuvirðið í at almannakunngera avgerðir er avmarkað. Tá mál verða gjørd navnleys, er man oftast noyddur til at taka burtur ymsar detaljur í avgerðini. Hetta førir við sær, at tað kann verða ógvuliga trupult hjá lesaranum at skilja. júst hvat tað er, ið er farið fram, og hvørji atlit Dátueftirlitið hevur lagt dent á. Vandi er tí fyri, at málið ikki til fulnar kann lýsir praksis hjá Dátueftirlitinum, og harvið er endamálið, í hvussu so er ein partur við at kunna um avgerðir alment, heldur ikki til staðar.

Um Dátueftirlitið hinvegin kundi almannakunngera avgerðir uttan at gera tær navnleysar, hevði tað verið nógv lættari at greitt frá, hvat eitt ávíst mál snúði seg um og at lýst niðurstøðuna hjá Dátueftirlitinum – og harvið eisini fatanina av, hvussu løgtingslógin eigur at verða tulkað. Nyttuvirðið í at almannakunngera hevði tí verið munandi størri.

Sambært dátuverndarlógini kann Dátueftirlitið m.a. geva kravboð og átalur um løgtingslógin ikki verður hildin og kann – í síðsta enda – eisini melda mál til løgregluna. Tað eru tó bert privatir dátuábyrgdarir, og dátuviðgerðar, ið kunnu revsast sbrt. løgtingslógini. Hesin møguleikin er ikki til staðar, tá talan er um almennar og kommunalar myndugleikar. Um ein almennur stovnur ikki tekur kravboð og/ella átalur til eftirtektar, er tað avmarkað hvat Dátueftirlitið fær gjørt, annað enn at venda sær til ein hægri myndugleika og heita á viðkomandi myndugleika um at fara inn í málið. Um ein avgerð um eitt nú átalu kundi almannakunngerast, hevði hetta skapt negativa almenna umrøðu av viðkomandi stovni, og hevði hetta óivað havt ein uppalandi virkna, eins og álitini hjá Løgtingsins Umboðsmanni hava havt á almennu fyrisitingina, og sum átalur frá eitt nú Landsgrannskoðanini, og

nýliga Landslæknanum, hava. Avgerðir hjá Føroya Kærustovni verða somuleiðis almannakunngjørdar uttan, at navnið á viðkomandi myndugleika verður tikið burtur.

Harumframt metir Dátueftirlitið, at tað er ikki nakað ið talar fyri at verja stovnarnar og fyritøkurnar, ið ikki halda dátuverndarlógina ella velja at gera eftir boðum frá Dátueftirlitinum. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um almennar stovnar, sum ikki halda landsins lógir ella ikki eftirliva boð frá einum eftirlitismyndugleika.

At enda skal viðmerkjast, at hóast § 73 avmarkar Dátueftirlitið til bert at almannakunngera avgerðir í navnleysum líki, so eru reglurnar um innlit í bæði innlitislógini og fyrisitingarlógini framvegis galdandi, og innlit kann fáast í eina avgerð í tann mun hesar løgtingslógir loyva tí. Í praksis merkir tað, at ein miðil kann, í flestu førum, fáa innlit í eina avgerð sum Dátueftirlitið hevur almannakunngjørt navnleyst, og síðani almannakunngera hana á sínum miðlapalli.

Samanumtikið metir Dátueftirlitið, at ein broyting av § 73, ið loyvir Dátueftirlitinum at almannakunngera avgerðir uttan at gera tær navnleysar hevði gagnað arbeiðinum hjá eftirlitinum, bæði tí at tað ger tað munandi lættari at lýsa – og skilja – praksis hjá Dátueftirlitinum, og tí at vandin fyri at enda á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum óiva hevur ein fyribyrgjandi virknað. Harumframt kunnu flestu aðrir eftirlitismyndugleikar almannakunngera sínar avgerðir, eins og tað er vanligt millum tey norðurlensku dátueftirlitini, ið Dátueftirlit samstarvar við.

Vegna Dátueftirlitið,

Tóri Højgaard
stjóri

Helga á Borg
formaður í Dáturáðnum